

# Metúrslit hjá Eik Banka

**Eik Banki almannakunngjørdi á middegi besta úrslit í søgu bankans. Yvirskotið fyri skatt er 465,3 milliónir krónur**

FÍGGJARVINNA
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*

Tað dró út hjá nevndini í Eik Banka at fáa góðkent roknskapin fyri árið í fjør. Nevndin sat á fundi allan fyrrapartin, áðrenn hon trýsti á grøna knøttin, sum sendir ársúrslitið til virðisbrævamarknaðin og síðani fjølmiðlarnar. Men tá roknskapurin so kom á middegi, minuttir fyri evstamark hjá Sosialinum, bar til at staðfesta besta ársúrslit hjá Eik Banka nakrantíð.

Yvirskotið fyri skatt er 465,3 milliónir krónur. Samanborið við 2006 er talan um eina framgongd á góðar 158 milliónir krónur, svarandi til 51,5 prosent.

Eik Banki hevur rentað sín eginpening 32,5 prosent eftir skatt. Eginpeningurin er nú 2,1 milliardir, samanborið við 1,2 milliard árið fyri. Eik Banki hevur sett sær sum mál, at renta sín eginpening við í minsta lagi 15 prosentum árliga. Solvensurin í Eik Banka er nú 12,0 prosent móti 11,0 prosentum árið fyri. Lógarkravið er 8 prosent.

## Eik veksur

Eik Banki er farna árið skrásettur á virðisbrævamarknaðunum í Íslandi og Keypmannahavn. Somuleiðis hevur Eik-samtakið gjørt eina røð av strategiskum uppkeypum, bæði í Føroyum og Danmark. Tað hevur fingið bankan at vaksa.

Stóri vøksturin í virkseminum kann millum annað lýsast við javna bankans, ið eftir einum ári er øktur 84 prosent. Roknskapurin hjá Eik-samtakinum javnvigar nú við 21,7 milliardum krónum, samamborið við 11,8 milliardum árið fyri.

## Nøgdur stjóri

Metstóra yvirskotið hjá Eik Banka elvir sjálvandi til nøgdsemi í bankanum.

- Heilhjartaði innsatsurin hjá øllum í samtakinum hevur ført Eik fram til enn eitt úrslit, sum partaeigararnir kunnu fegnast um. Bæði úti og heima stendur Eik-samtakið í dag í einari sterkari strategiskari støðu, ið er gott grundarlag undir framhaldandi vøkstri, sigur Marner Jacobsen, forstjóri í Eik.

Eik Banki er bjartskygdur um útlitini fyri 2008. Bankin væntar eitt yvirskot uppá 335 milliónir krónur, áðrenn virðisjavning, burturleggingar og skatt. Hetta er umleið 25 milliónir krónur

**Ársúrslitið hjá Eik Banka varð sum nevnt almannakunngjørt bara fáar minuttir fyri evstamark hjá Sosialinum. Meira verður at lesa um ársúrslitið í Sosialinum í morgin**

# KROSSORÐ

| 538 | HANDILS-FÆ | FINSKUR BÝUR | PARLA-MENT | LAND | NORSKUR BÝUR | RUSSISK Á | LAND Í AFRIKA | KALIUM | HØVDI | LITUR | FUGLUR | ROMAR-TAL | NÝGGJ STJØRNA | SÚRT ANDLIT | INTELLI-GENS-KVOTIENTUR | ILLA FYRI |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| STAKKAR N. F. EIÐISKOLL | 1 | | | | | ▶ | | ▶ | | | | | | | | |
| HEIMS-PARTUR | | | | | | | | EITT / TÍÐINDA-STOVA | | TVÍLJÓÐ / URAN | 2 | KLÁRI | | | | |
| AMERIKA-NARI | | | | | | | | | | | | VOCAL / SÓL-GUDUR | | | EDD | |
| EINSA-MALLA | | | | 3 | | BÚSKAP. STYTTING / KVINNA | | | | STÓRT LAND / ÓSI | | | | | URAN / KVINNA | |
| HJÁLJÓÐ | | | | ÚR FJALLA-VATNI / STÁKAN | | | 4 | | | | AMPERE / OMAN FYRI | | KORT-BÓK | KLOKKA / EINS | | |
| SÓL-GUDUR | | | KVINNA / BORIÐ VIÐ | | | | | MAÐUR / IKKI NÓGVAR | | | | KVINNU / ITALIA | | | | |
| ABER-DEEN | | PLANTA / SPANIA | | | 5 | | SPYRJ-ANDI / Í LØTUNI | | | | | | | | | |
| ? MADRID | | 6 | | | MAÐUR | TRÆ / HERLIÐ | | | | | | LITUR | | FUGLURIN | TÝSK-LAND / SÚT | |
| FOSFOR | | RÍKIDØMI / SILICIUM | | | | 7 | | | | | | SVASSI / ALFA | | | | |
| GOMUL SLUPP | | | | | | | SMÁALDA | | | | EFTIR-NAVN / VINNU-MAÐURIN | | | | | |
| NIKKEL | | | FUGLUR / MAÐUR | | | | SPILLA | GEN-TILFAR / KVINNA | | 8 | | | PAPPÍR / IKKI TÚ | | | |
| ITALIA | | STREYMUR / DONSK OYGGJ | | | ☆ | RHODE ISLAND / TONS | | | ILJUSHIN / SVÁVUL | | | ALTSO / MAÐUR | | | | |
| MONGD | | | | 9 | VEKT-EIND / HEIÐUR | | | | | TIRRI | | | | | MEGA / MAÐUR | |
| GRAMM | | ITALIA / NATRIUM | | REAUMUR / TÓRS-HAVN | | TVØRA-SKIP / FRIÐUR | | | LITUR | TÓNI / LAND-SYNNINGUR | | | FJALL / TITANIUM | | | |
| UNITED NATIONS | | | STERKUR GUDUR / NORÐUR | | | | LOÐIÐ / KIRKWALL | | | | | | | 51 / SVØRÍKI | | 10 |
| KANNING | | | | | | | | | PINNAR | | 11 | | | | | |

## Vinnari:

*Høgni L. Rasmussen*
*Á Frælsinum 8*
*Tórshavn*

## Loysnin frá seinastu viku
## Loysunarorðið: MUNKAGRUNNUR

| | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| M | A | R | K | N | A | G | J | Ó | G | V | | K | R | Á | M |
| E | G | O | N | | L | J | | L | I | I | | A | U | L | A |
| I | N | | O | D | D | A | F | I | S | K | U | R | | I | L |
| R | A | K | S | T | U | R | | J | N | U | | | A | N | A |
| I | R | I | S | | B | | F | Á | A | N | L | I | G | | N |
| L | | N | A | R | R | A | | K | R | I | N | G | U | R | |
| U | | A | S | K | O | V | | U | | | | N | E | Y | Ð |
| T | A | | T | | T | R | I | P | P | | L | A | D | A | |
| I | L | T | | S | | I | R | | S | A | L | T | A | N | |
| 537 | D | I | K | T | A | T | U | R | | K | | I | | | B |
| R | U | L | L | A | R | | N | Ó | T | A | R | U | L | L | A |
| A | B | | Ø | R | | E | | S | | N | A | S | A | | K |
| N | Á | | N | A | G | G | A | T | Ó | D | N | | V | A | |
| N | R | | | R | A | N | I | | | I | N | N | A | R | A |
| V | A | T | T | | B | I | N | G | O | | | | | N | L |
| U | N | D | I | R | B | R | O | T | L | I | G | H | E | I | T |

## Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta nr. ...« á bjálvan.

**538**

**Loysunarorðið:** ..........................................

Navn: ..............................................................

Bústaður: ......................................................

Bygd/býur: ....................................................

***Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!***

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- ☐ **Okkara kokkar** – *Gudmund Gudmundsson*
- ☐ **Grund 1** – *Steinbjørn B. Jacobsen*
- ☐ **Ein farri av kolvetni** – *Marjun Kjelnes*
- ☐ **Veður og tíðindi í Føroyum 1875–2002** – *Petur Skeel Jacobsen og Finnbogi Ísakson*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- ☐ **Heimsatlas**
- ☐ **Føroysk Flora** – *Jóhannes Jóhansen*
- ☐ **Havið** – *Bogi Hansen*
- ☐ **Heimsins lond**
- ☐ **Grót og steinar** – *Martin Heinesen týddi*

***Bøkur og annað tilfar***
***– bæði innan og uttan skúlagátt***